# Eyðun av Reyni í Galerie Focus



*Fríggjadagin 25. august letur ein framsýning við málningum hjá Eyðun av Reyni upp í Galerie Focus*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

TÍÐINDASKRIV

Fríggjadagin 25. august kl. 16 til 18 letur ein framsýning við málningum hjá Eyðun av Reyni upp í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn.

Eyðun av Reyni er kolor-istur, og dramaið í náttúruni hugtekur hann, dramaið er t.d. stormur, brim, ljós og myrkur.

Á framsýningini eru olju-málningar á lørift. Máln-ingarnir eru abstraktar temp-eramentsfullar kompositi-ónir.

Framsýningin verður opin til 8. september, týsdag til fríggjadag kl. 15 til 18 og leygardag kl. 16 til 18.

Miðvágs Fornminnafelag:

# Kvøldseta í Miðvági



TÍÐINDASKRIV

Í ár eru 60 ár liðin síðan 62 føroyingar fóru á hvalaveiðu í Suðurhøvum við Willem Barendsz. Í hesum sam-bandi skipar Miðvágs Forn-minnafelag fyri kvøldsetu í Bygdaskúlanum í Miðvági leygardagin 2. september kl. 19, har m.a. myndir og annað forvitnisligt frá túrinum verður sýnt fram.

Av teimum 62 sum fóru avstað, eru 5 á lívi í dag og tvier av teimum, Ludvík Jacobsen í Miðvági og Martin Tórgarð, ættaður úr Nólsoy og búsitandi í Havn, koma at siga frá túrinum, sum vardi í 8 mánaðir.

Langt var at fara, og nógv var at síggja hjá hesum monnum, sum næstan komu á Suðurpólin.

Brot úr dagbók hjá einum av teimum sum við vóru verður lisin upp.

Sangur og drekkamunnur eru eisini á skránni. Kostn-aður kr. 40,00.

✝

## Andlát og jarðarferðir

**Óla Jákup Hansen**, ættaður úr **Sørvági** búsitandi í **Leynum**, andaðist mánadagin 21. august í heim-inum, 71 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

Kistan við **Berlinu Sólsker** fer úr Landssjúkra-húskapellinum í kvøld kl. 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni hósdagin kl. 13.

**Ragnhild Djurhuus úr Hvalvík**, ættað úr **Fuglafirði**, andaðist á røktarheiminum Mørkin í Streymnesi, mánadagin 21. august, 89 ára gomul. Kistan fer av Mørkini í kvøld kl. 19. Jarðarferðin verður úr Hvalvíkar kirkju hósdagin kl. 14. Sálmabókin verður nýtt. Tey, ið vilja minnast Ragnhild, kunnu lata Hvalvíkar kirkju ella Hvalvíkar missiónshúsi eina gávu.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum ið sýndu samkenslu,
tá okkara elskaðu foreldur, verforeldur, omma og abbi,
langomma og langabbi

**Hilda Christiansen, fødd Hansen**
**og Sjúrður Christiansen**
Klaksvík

við so stuttum millumbili andaðust og vórðu jarðað.

Tøkk til prestar og kirkjutænarar,
tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu teimum
til teirra seinasta hvíldarstað
og á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðirnar.
Ein serlig tøkk til Klaksvíkar Sjúkrahús fyri vælvild og
hjálpsemi til pápa okkara,
tá ið mamma okkara andaðist.
Tøkk fyri minnisgávur til Javna og kirkjuna á Kirkju.

*Familjunnar vegna*
**Marita, Óluva, Kristina, Eyðstein og Hans Jákup**

**85 ára føðingardagur**
Í dag, 23. august, fyllir Laurits Abrahamsen, Lamba, 85 ár. Hann er burturstaddur føðingardagin.a

**Dagurin í morgin**
**24. august. Bartalsmessa ella bartalsøka**. Til minnis um lærusveinin Bartolomeus. Halgisøgan sigur, at tá ið ápostlarnir skiltust, fór hann eystureftir til Armeniu, Mesopotamiu og Indiu, har hann varð tikin av døgum av uppøstum avgudaprestum. Í træskurðinum á einum av kirkjubøstólunum sæst hann við kvívi í hendi, ið sipar til, at hann varð flettur livandi. Navnið merkir sonur Ptolemeusar.
24. august 1943 var eitt løgtingsval, sum varð rópt bartalsmessuvalið.